## Spæla bingo á netinum

Danske Spil – fyrrv. Tipstjenesten – er nú fari undir bingo-spæl á netinum. Á heimasíðuni ber til at keypa sær plátu, og tá nýtt spæl byrjar fjóðra hvørt minutt, er bíðitíðin lítil og eingin. Vinningarnir í spælunum eru heilt upp í 100.000 kr., men í flestu spølunum eru hesir tengdir at samlaðu puljuni, sum er í spælinum.

Í tíðindaskrivi sigur Danske Spil, at tey við hesum serliga vóna at fáa fleiri kvinnuligar spælarar. Hóast veddingarspæl ofta verða tengd at mannfólki, so vísa kanningar, at tað eru konufólk, sum standa fyri 75% av samlaða umsetninginum á spælimarknaðinum.

## 150 ár við fríhandli

Nú 150 ár eru liðin, síðani Kongaligi einahandilin varð avtikin, verður alment tiltak á Vinnuháskúlanum tann 11. november klokkan 15. Høvuðsgoymslan og lesistovan hjá Landsskjalasavninum á Debesartrøð verða opin fyri almenninginum frá klokkan 14 til 18 og verða m.a. víst fram skjøl, ið hava við fríhandil og vinnu at gera. Á Norðoya Fornminnasavni verður sama tíðarskeið framsýning við skjølum frá handlinum hjá Jørgen Bech og Sønner inni á Apotekinum úti í Klaksvík. Á Tvøroyri verða gomlu handilshølini hjá T.F.Thomsen eisini opin og har fer ánarin, Anna Kirstin, at greiða frá um fyritøkuna, ið ognaði sær handilin tá Kgl. Handilin varð seldur í 1856. Í handlinum hjá T.F.Thomsen er hópur av gomlu handilsbókunum til skjals.

# Grein 14 heldur enn 266 b

## Revsilógin má vera neyv



Finnur Helmsdal, annar av uppskotsstillunum, um at fáa grein 266 b nevnda í revsilógini, soleiðis at samkynd eisini verða vard, heldur ikki nógv um uppskotið frá formanninum í Fólkaflokkinum, Anfinn Kallsberg. Anfinn Kallsberg skjýtur upp, at grein 14 í mannarættindasáttmálanum heldur skal takast við í revsilógina enn grein 266 b í revsilógini.

Finnur Helmsdal vísir á, at hann hvørki er løgfrøðingur ella hevur arbeitt burtur av við revsilógini, men at tað altíð hevur verið hansara greiða fatan, at revsilógin eigur at vera tann mest neyva av øllum.

– Grein 14 er so rúm fyri tulkingum, at ein dómari aldrin kann brúka hana at døma við, sigur Finnur Helmsdal, sum eisini ivast stórliga í, um danska Fólkatingið yvirhøvur hevði góðtikið hetta.

-rwd

**Anfinn Kallsberg hevur skotið upp, at grein 14 í Mannarættindasáttmálanum skal skoytast upp í revsilógina heldur enn, at vit samtykkja grein 266 b, sum nú er til viðgerðar, men løgfrøðingur ivast í, um tað hevði borið á mál**

POLITIKKUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Tað er ógvuliga ymiskt hvat tingfólk halda um uppskotið hjá Annitu á Fríðriksmørk og Finni Helmsdal, og í tingviðgerðini kom Anfinn Kallsberg við einum øðrum uppskotið, sum sambært honum tryggjar rættindini hjá øllum, eisini samkyndum, uttan at samkynd verða nevnd*

*Mynd Jens Kr. Vang*

Í týsdagsblaðið okkara og tingsins røðarapalli seinnapartin týsdagin, skeyt Anfinn Kallsberg upp, at vit í staðin fyri at skoyta grein 266 b upp í revsilógina, heldur broyta verandi revsilóg okkara soleiðis, at grein 14 í mannarættindasáttmálanum beinleiðis verður sett í revsilógina.

Grein 14 í mannarættindasáttmálanum sigur soleiðis:

"Nydelse af denne konventions anerkendte rettigheder og friheder, skal sikres uden forskel på grund af køn, race, farve, sprog, religion, politisk eller anden overbevisning, national eller social oprindelse, tilhørsforhold til et nationalt mindretal, formueforhold, fødsel eller ethvert andet forhold".

– Hetta er tað, sum Føroya Løgting í 1995 bant seg til at halda í eini altjóða samtykt og hetta er tað, vit eiga at innføra í eina revsirættarlóg í Føroyum, segði Anfinn Kallsberg í tinginum týsdagin.

### Sigur onki um samkynd

Anfinn Kallsberg legði somuleiðis dent á, at í hesi grein stendur onki um seksuella orientering, men at greinin kortini innibar, at eitthvørt menniskja sambært hesum hevði rætt til at verða virt líkamikið hvat.

– Hetta átti ikki at verið ein trupulleiki at innført, tá bæði Føroya Løgting og danska Fólkatingið hava samtykt henda millumlanda sáttmála, sigur Anfinn Kallsberg.

Vísir tað seg tó, at hetta verður ein trupulleiki, so hevur Anfinn Kallsberg ein annan møguleika kláran.

– Hin møguleikin er rætt og slætt at yvirtaka revsilógina, tí tað kunnu vit gera uttan hóvasták við yvirtøkulógini í hondini, segði Anfinn Kallsberg við Sosialin týsdagin.

Løgfrøðingurin Halgir Winther Poulsen er tó ikki heilt samdur við Anfinn í hesum. Hann ivast í, um tað ber til at so serstaka revsilóg galdandi bara fyri Føroyar.

– Eg meti heldur ikki tað er sambarligt at seta eina antidiskriminatión í revsilógina, og at tað ber á mál, sigur Halgir Winther Poulsen.

### Dómarnir avgerandi

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevði eisini orðið í tinginum týsdagin. Hann segði um uppskotið hjá Anfinni, at hann skilti hann væl hansara tankar við uppskotinum, men vísti til grein í Sosialinum fríggjadagin hjá Halgir Winther Poulsen, løgfrøðingi.

– Tað eru dómarnir aftanfyri hesa grein, sum eru áhugaverdir. Dómarnir eru rættarkeldan og ískoyti til sáttmálan, og tað eru teir, sum eru áhugaverdir í hesum samanhanginum, vísti løgmaður, Jóannes Eidesgaard á.

### Grein 14 í mannarættindasáttmálanum:

»Nydelse af denne konventions anerkendte rettigheder og friheder, skal sikres uden forskel på grund af køn, race, farve, sprog, religion, politisk eller anden overbevisning, national eller social oprindelse, tilhørsforhold til et nationalt mindretal, formueforhold, fødsel eller ethvert andet forhold«.



*– Hetta er tað, sum Føroya Løgting í 1995 bant seg til at halda í eini altjóða samtykt og hetta er tað, vit eiga at innføra í eina revsirættarlóg í Føroyum, sigur Anfinn Kallsberg um sítt uppskot*